TING-HELLAN

# lið verður eitt valdømi

tríggir nú fráfarnu politikkarar, vóru við í politikki í nógv ár, og tað frammalaga eisini. Tveir av teimum vóru enntá ferðslumálaráðharrar í síni tíð og høgt virdir menn. Nú verður eisini sagt, at tað er saknur í teimum.

Hetta fær meg eisini at hugsa um føroyskan politikk. Hevði hann ikki verið nógv fátækari, um ikki persónar sum Heini í Kunoy, Jógvan við Keldu og Hergeir Nielsen, fyri bert at taka nøkur dømi, høvdu gjørt so nógv burtur úr sínum valdømum. Fer ein longur aftur í tíðina, kann ein ikki koma uttanum, at tað ikki bara var av tilvild, at fyrstu Suðuroya tunnlarnir komu, meðan Petur Mohr Dam var løgmaður, og at Borðoya tunnlarnir komu meðan Hákun Djurhuus var løgmaður. Hesir tunnlar høvdu í sjálvum sær alstóran týdning, men fingu eisini stóran týdning sum royndarprojektir fyri komandi útbygging. Í heila tikið má helst staðfestast, at um ikki lokalar kreftir arbeiddu fyri sínum økjum, so hevði landið og samfelagið verið nógv fátækari, bæði hvat livilíkindum viðvíkjur og eisini samfelagsbúskaparliga.

Mær kemur eisini til hugs tað sum hendi í 1975. Eg minnist týðuliga seinasta stóra politiska orðaskifti í tinginum áðrenn valið í 1974. Eg var tá valdur í Eysturoyar valdømi og stillaði eisini uppaftur har valið 1974. Undir tí orðaskiftinum segði eg, at um eg varð afturvaldur, vildi eg arbeiða fyri og atkvøða fyri, at eitt nýtt størri og betur skip varð útvegað til Suðuroya siglingina. Aftaná at nýtt landsstýri var skipað í byrjanini av 1975 kom okkara flokkur við í samgonguna. Eitt tað fyrsta, sum tá varð gjørt, var, at keypa táverandi Mortan Mols, núverandi Smyril, til at røkja fyrst og fremst Suðuroya rutuna. Hetta var eitt veldugt framstig, og eg dugi ikki at ímynda mær, hvussu viðurskiftini høvdu verið, um hetta tiltakið ikki varð framt tá.

Men mótstøðan var ovurhonds stór. Hetta var fyrstu ferð eg sum politikkari var beinleiðis forfylgdur og álopin, bæði verbalt og fysiskt. Men uppaftur verri var tað hjá tí eina lokalpoltikkaranum úr sambandsflokkinum, sum atkvøddi fyri. Hann bleiv frystur úti av flokkinum, og kom ikki aftur fyri seg landspolitiskt. Men tá ið avtornaði og tíðin leið, so vóru øll nøgd , og til síðst vildi eingin rættiliga kennast við at hava verið ímóti tiltakinum Í hesum føri fekk skipið alstóran týdning fyri Suðuroynna. Seinri kann nakað tað sama sigast um Vágatunnillin. Stór mótstøða, men sum øll vóru glað, tá hann kom. Samanumtikið kann bara sigast, at øll øki hava sín lutfallsliga rætt til menningina av samfelagnum.

Hetta fær meg at koma til ta niðurstøðu, at tað kann ikki vera rætt at gera alt landið til eitt valdømi. Vandi vil tá vera fyri, at summir lokalpolitikkarar ikki vera valdir, og saknur verður í teimum. Hetta vil hindra eina javna og skilagóða útbygging av øllum landinum. Og vit hava brúk fyri øllum landinum, tað er ikki støri enn so.

Tí hevur tað líka stóran týdning, at øll økir vera umboða, sum at matematiska javnvágin millum flokkarnar er røtt. Men bæði endamálini kunnu røkkast. Í løtuni eru 27 valdømisvaldir tingmenn og upp til 5 eykavaldir. Tilsamans 32. Størsta valdømi, Suðurstreymoyar, hevur 8 valdømisvaldar, meðan næststørsta, Eysturoyar, hevur 5. Hini hava 4 og 2.

Um vallógin varð broytt til at samanlagt kunnu veljast 33 tingmenn (sum stýrisskipanarlógin loyvir) høvdu longu her verið 6 eykavaldir móti núverandi 5. Men harafturat kundi talið av valdømisvaldum í teim báðum fólkaríkastu valdømunum veri lækkað. Býtið kundi sostatt verið hetta:

| | |
|---|---|
| Norðoya valdømi | 4 valdømisvaldir |
| Eysturoya valdømi | 4 valdømisvaldir |
| Norðstreymoyar valdømi | 2 valdømisvaldir |
| Vága valdømi | 2 valdømisvaldir |
| Suðurstreymoyar valdømi | 6 valdømisvaldir |
| Sandoyar valdømi | 2 valdømisvaldir |
| Suðuroyar valdømi | 4 valdømisvaldir |
| Tilsamans | 24 valdømisvaldir |
| Harafturat koma | 9 eykavaldir |
| Hetta gevur tilsamans | 33 tingmenn. |

Hendan skipanin tryggjar øllum valdømum umboðan, eisini teimum við lítlum fólkatali. Hinvegin vilja tey stóru valdømini, sum lutfallsliga fáa færri valdømisvaldar, fáa teir flestu av teim eykavaldu. Samstundis gevur hetta eitt lutfallsliga rættari (summi rópa tað rættvísari) býti millum politisku flokkarnar. Hendan skipanin tryggjar sostatt bæði tað politisk/ideologisku umboðanina og gevur lokalu áhugamálunum rættiliga góðar umstøður.

Ein lítul fyrimunur við hesi broytingini er eisini, at hon er løtt at gjøgnumføra. Tað eru bert fáar lógarbroytingar, sum skulu gerast, so Innlendismálaráðnum nýtist ikki at syngja sítt vanliga niðurlag um, at tað ikki hevur orku til ar arbeiða við málinum.




ROKNSKAPUR FYRI TÍÐARSKEIÐIÐ
1. JANUAR 2005 - 30. JUNI 2005

| RAKSTRARROKNSKAPUR | 1/1-30/6-2005 | 1/1-30/6-2004 |
|---|---|---|
| | tkr. | tkr. |
| Rentuinntøkur v.m. | 101 | 77 |
| Vinningur av partabrøvum v.m. og øðrum kapitalpørtum | 10 | 30 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v.m. | 2.166 | 1.949 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir v.m. | -133 | -30 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra v.m. | 1.145 | 145 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 6.704 | 2.275 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **9.993** | **4.446** |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m. og umsiting | -5.150 | -3.816 |
| Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | -158 | -93 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | -933 | -835 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **3.752** | **-298** |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **3.752** | **-298** |
| Skattur | 750 | 0 |
| **ÚRSLIT** | **3.002** | **-298** |

| FÍGGJARSTØÐA | 30/6-2005 | 30/6-2004 |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| Áogn hjá kredittstovnum v.m. | 8.447 | 6.772 |
| Lánsbrøv v.m. | 0 | 0 |
| Partabrøv v.m. | 8.513 | 4.633 |
| Ítøkiligar ognir | 637 | 188 |
| Onnur ogn | 84 | 50 |
| Tíðaravmarkingar | 5.546 | 2.653 |
| **OGN TIL SAMANS** | **23.227** | **14.296** |
| **SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR** | | |
| Onnur skuld | 2.238 | 915 |
| Tíðaravmarkingar | 372 | 300 |
| **Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 10.000 | 10.000 |
| Yvirkursgrunnur | 1.914 | 1.914 |
| Flutt úrslit til samans | 8.703 | 1.167 |
| **Eginpeningur til samans** | **20.617** | **13.081** |
| **SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR TIL SAMANS** | **23.227** | **14.296** |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| Ábyrgdir | 181 | 149 |

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F,
Tinghúsvegur 14, Postboks 3090,
FO-110 Tórshavn,
Tel +298 35 15 00, Fax +298 35 15 01
www.kaupthing.fo

Skrásetingar nr. p/f 2997